**Sirið Stenberg**
**Bjørg Brynhildardóttir Egholm**
**Hervør Pálsdóttir**
**Høgni Hoydal**
**Liljan Weihe**
**Eirikur í Jákupsstovu**
**Ruth Vang**
**løgtingsfólk**

Løgtingið

**Uppskot til**

**Løgtingslóg**
**um**
**stutttíðarleigu av bústøðum**

**§ 1.** Løgtingslógin fevnir um stutttíðarleigu av húsum, íbúðum og øðrum sjálvstøðugum bústøðum, undantikið bústaðir har útleigari hevur sín fasta bústað sambært fólkayvirlitinum.

*Stk. 2.* Stutttíðarleiga verður í hesi løgtingslógini skilmarkað sum útleigan av einum sjálvstøðugum bústaði til bústaðarnýtslu í styttri tíð enn tríggjar mánaðir.

*Stk. 3.* Sjálvstøðugir bústaðir verða í hesi løgtingslógini skilmarkaðir sum bústaðir við egnari adressu.

**§ 2.** Kommunum verður heimilað at áseta reglur fyri, hvussu nógvar dagar árliga sjálvstøðugir bústaðir, har útleigari ikki hevur sín fasta bústað, kunnu verða útleigaðir til stutttíðarleigu.

*Stk. 2*. Kommunum verður heimilað at áseta reglur, sambært stk. 1, fyri avmarkaði øki í kommununi, til dømis innan ávís bygdamørk ella ávísar býarpartar.

*Stk. 3.* Reglur, ásettar sambært stk. 1 og 2, kunnu í fyrsta lagi setast í gildi seks mánaðir eftir, at kommunustýri hevur samtykt tær.

**§ 3.** Ásetur kommunustýri reglur sambært § 2, stk. 1 og 2, skal kommunan gera skrá við dagførdum upplýsingum um sjálvstøðugar bústaðir, ið verða útleigaðir til stutttíðarleigu, eins og kommunan skal hava eftirlit við, at dagatalsmarkið verður hildið.

*Stk. 2.* Kommunum verður heimilað at fáa til vegar neyðugar upplýsingar til arbeiðið at gera skrá og hava eftirlit, sambært stk. 1, frá útleigara, almennum stovnum, útleigupallum, streymveitarum, tryggingarfyritøkum o.tíl.

*Stk. 3*. Útleigarar, eins og útleigupallar, streymveitarar, tryggingarfeløg o.tíl., hava, eftir umbøn frá kommununi, og innan ta freist, ið kommunan hevur ásett, skyldu til at útflýggja allar viðkomandi upplýsingar til arbeiðið at gera skrá og hava eftirlit við dagatalsmarkinum.

*Stk. 4.* Landsstýrisfólkið kann áseta nærri reglur um skráseting av stutttíðarleigubústøðum, umframt nærri reglur um eftirlit við dagatalsmarkinum.

**§ 4.** Við sekt verður revsaður tann, sum leigar út sjálvstøðugan bústað, har útleigari ikki hevur fastan bústað, fleiri enn teir dagar, ið kommunan hevur ásett sambært § 2, stk. 1, eins og tann, ið ikki útflýggjar tær upplýsingar, sum kommunan umbiður, og innan ta freist, ið kommunan hevur ásett sambært § 3, stk. 3.

*Stk. 2.* Revsiábyrgd kann verða áløgd løgfrøðiligum persónum sambært reglunum í 5. kapitli í revsilógini.

*Stk. 3*. Í reglum, givnar sambært § 3, stk. 4, kann verða ásett, at brot á reglurnar verður revsað við sekt.

**§ 5.** Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

## Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Seinastu árini er stutttíðarleiga av bústøðum serliga til útlendsk ferðafólk vorðin alt meira vanlig í Føroyum. Nógvastaðni er hetta til nyttu og gagn, meðan tað aðrastaðni ávirkar bústaðarmarknaðin og møguleikarnar hjá fólki at finna sær fastan bústað.

Orsøkin til tað er, at nógv av hesum stutttíðarleigumálum høvdu verið væl egnað til langtíðarleigu og harvið økt um útboðið av bústøðum.

Stutttíðarleiga virkar hartil í støðum lið um lið við gistingarhúsvinnuna, men eftir munandi øðrvísi krøvum, og tí er eisini viðkomandi at meta um, hvørt kappingin er jøvn millum tey, sum veita gisting til ferðafólk.

Tørvur er á at skipa karmar um hetta virksemið.

### 1.2. Galdandi lóggáva

Tað eru eingin lóggáva um stutttíðarleigu í Føroyum.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Stutttíðarleiga er ein góður møguleiki hjá fólki at taka lut í ferðavinnuni, um bústaður teirra ella partur av bústaðnum er tøkur eina tíð. Eisini ber til við stutttíðarleigu at gagnnýta summarhús betur, men um vinningurin av at leiga út til stutttíðarleigu er nógv størri, enn um leigað verður út í langtíðarleigu til fastan bústað hjá fólki, er skjótt, at bústaðarmarknaðurin verður skeiklaður.

Nógvastaðni í Føroyum er vorðið sera trupult og dýrt at seta búgv, serliga á størru plássunum, har landfast er, og tað er eyðsæð, at stóra útboðið av bústøðum, ið verða leigaðir út sum stutttíðarleigumál, er partur av trupulleikanum.

Avbjóðingarnar við stutttíðarleigu eru ikki tær somu um alt landið. Tað, sum á størru plássunum er ein stór bústaðaravbjóðing, kann í summum bygdum verða ein møguleiki at fáa økt ferðavinnuvirksemi, og at seta í stand og brúka hús, sum annars standa tóm.

Neyðugt er tí at leggja upp fyri, at viðurskiftini eru ymisk, alt eftir hvørji øki í landinum talan er um. Tískil verður skotið upp at geva kommununum heimild til at gera reglur, sum kunnu avmarka stutttíðarleiguvirksemi.

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

*Ásetingar fyri sjálvstøðugar bústaðir*

Ásett verður, at avmarkingar fyri stutttíðarleigu bert eru galdandi fyri sjálvstøðugar bústaðir, har útleigari ikki hevur sín fasta bústað sambært fólkayvirlitinum.

Í bústaði, har útleigari sjálvur býr, verður heimild ikki veitt kommunum at avmarka stutttíðarleigu. Endamálið við uppskotinum er tískil ikki at avmarka møguleikarnar hjá fólki at leiga út partar av egnum bústaði. Hinvegin er eitt av endamálunum við lógaruppskotinum at økja um útboðið av bústøðum til langtíðarleigu í økjum, har tørvur er á tí.

*Heimild til kommunur um at áseta mest loyvda dagatal*
Ásett verður, at kommunur fáa heimild at áseta mest loyvda tal av døgum, sum ein sjálvstøðugur bústaður kann verða leigaður út til stutttíðarleigu. Heimildin er bert galdandi fyri sjálvstøðugar bústaðir, har útleigari ikki hevur sín fasta bústað sambært fólkayvirlitinum.

Velur ein kommuna at brúka heimildina og áseta mest loyvda dagatal, kann kommunan frítaka summarhúsøki og líknandi frítíðarbústaðir frá ásetingunum. Hetta kundi til dømis verið viðkomandi í økjum, har bústaðir eru gjørdir burturav til ferðafólk. Samstundis kann kommunan brúka heimildina at áseta mest loyvda dagatal fyri ávís øki í kommununi. Tað kundi til dømis verið fyri ávísar býarpartar ella einstakar bygdir í kommununi, har mett verður neyðugt at avmarka stutttíðarleiguvirksemi.

Á henda hátt ber til hjá kommunum at seta dagatalið eftir tørvinum á staðnum. Í kommunum, har tað er trupult at fáa fastan bústað, ella har nógv stutttíðarleiguvirksemi órógvar trivnaðin í einum øki, kann dagatalið setast lágt. Har ætlanin er at økja ferðafólkavirksemi og gistingarmøguleikarnir eru fáir, kann dagatalið vera størri ella óavmarkað.

Um kommunur áseta mark fyri, hvussu nógvar dagar ein sjálvstøðugur bústaður kann leigast út til stutttíðarleigu, skal kommunan gera og røkja skrá yvir bústaðir, ið verða brúktir til stutttíðarleigu. Eisini skal kommunan hava eftirlit við, at dagatalsmarkið verður hildið. At skipa arbeiðið at gera skrá og hava eftirlit við dagatalinum kann fyri serliga smærru kommunurnar vera ein avbjóðing, tí umsitingarliga orkan kann vera lítil. Vísast kann í hesum sambandi til, at møguligt er hjá kommununum at samstarva um hesar uppgávur.

### 1.5. Ummæli og ummælisskjal

Áðrenn valið í vár var landsstýrið samt um at leggja eitt uppskot fyri tingið, sum er nærum meinlíkt hesum.

Uppskotið í vár hevði verið til ummælis hjá fleiri pørtum, men tey ummælisskjølini vórðu ikki løgd alment fram, tí táverandi løgmaður útskrivaði val, meðan uppskotið var til eftirkanningar í løgtinginum, og tí kom málið ongantíð til viðgerðar.

Tað uppskotið hevði harumframt verið til almenna hoyring á heimasíðuni hjá Tilfeingis- og vinnumálaráðnum í tíðarskeiðinum 13. januar - 3. februar. 2026.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Lógaruppskotið hevur ongar fíggjarligar avleiðingar fyri landið ella landsmyndugleikar.

Fyri kommunur, ið velja at brúka heimildirnar í § 2 um at áseta mest loyvda dagatal fyri stutttíðarleigu, hevur lógaruppskotið ávísar fíggjarligar avleiðingar. Tað krevst ein ávís umsitingarlig arbeiðsorka at seta í gildi og at umsita reglur fyri hetta økið. At føra skrá yvir stutttíðarleigubústaðir og at hava eftirlit við dagatalsmarkinum hevur eisini ávísar fíggjarligar avleiðingar fyri kommunurnar.

Tað er ilt at meta nágreiniliga um fíggjarligu avleiðingarnar. Verður dagatalsmark ásett fyri smærri øki við fáum stutttíðarleigubústøðum, verður mett, at hetta hevur sera avmarkaðar fíggjarligar avleiðingar fyri kommununa. Verður dagatalsmark hinvegin ásett fyri størri øki við nógvum stutttíðarleigubústøðum, kunnu fíggjarligu avleiðingarnar vera størri, m.a. orsakað av øktum útreiðslum til umsiting og eftirlit.

Lógaruppskotið hevur ikki fíggjarligar avleiðingar fyri kommunur, ið ikki brúka heimildirnar í § 2.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Lógaruppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar fyri landið ella landsmyndugleikar.

Fyri kommunur, ið velja at brúka heimildirnar í § 2 um at áseta mest loyvda dagatal fyri stutttíðarleigu, hevur lógaruppskotið ávísar umsitingarligar avleiðingar. Tað krevst ein ávís umsitingarlig arbeiðsorka at seta í gildi og at umsita reglur fyri hetta økið. At føra skrá yvir stutttíðarleigubústaðir og at hava eftirlit við dagatalsmarkinum hevur eisini ávísar umsitingarligar avleiðingar fyri kommunurnar.

Tað er ilt at meta nágreiniliga um umsitingarligu avleiðingarnar. Verður dagatalsmark ásett fyri smærri øki við fáum stutttíðarleigubústøðum, verður mett, at hetta hevur sera avmarkaðar umsitingarligar avleiðingar fyri kommununa. Verður dagatalsmark hinvegin ásett fyri størri øki við nógvum stutttíðarleigubústøðum, kunnu umsitingarligu avleiðingarnar vera størri, serliga til málsviðgerð í sambandi við eftirlit við dagatalinum.

Lógaruppskotið hevur ikki umsitingarligar avleiðingar fyri kommunur, ið ikki brúka heimildirnar í § 2.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

At áseta mest loyvda dagatal kann hava neiligar fíggjarligar avleiðingar fyri persónar ella fyritøkur, ið hava gjørt íløgur í hús, íbúð ella aðra bústaðareind við tí endamáli at leiga út til stutttíðarleigu. Mett verður ikki, at talan er um ognartøku, tí talan er um alment galdandi ásetingar, har eigarin framvegis hevur fult ræði á ognini, ið t.d. kann verða leigað út til langtíðarleigu. Slíkar avmarkingar fyri stutttíðarleigu vera tískil heldur ikki mettar at hava týðandi ávirkan á virði á ognini.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Lógaruppskotið gevur møguleika fyri, at kommunur kunnu avmarka stutttíðarleiguvirksemi í økjum, har mett verður, at ov nógv virksemi er. Hetta kann betra um trivnaðin í hesum økjum. Lógaruppskotið hevur í aðrar mátar ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Lógaruppskotið hevur sum útgangsstøði ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum. Tó so er eitt av høvuðsendamálunum við lógaruppskotinum at geva kommunum heimildir at áseta reglur um mest loyvda dagatal fyri stutttíðarleigu. Um kommunur velja at brúka hesar heimildir, kann hetta í ávísan mun hava ávirkan á teirra øki, tí møguleikarnir fyri stutttíðarleiguvirksemi verða avmarkaðir.

### 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

### 2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum

Eingin viðkomandi millumtjóðasáttmáli er á økinum.

### 2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

Mett verður at lógaruppskotið er í samsvari við *Hoyvíkssáttmálan* (Sáttmáli ímillum stjórn Íslands, øðrumegin, og stjórn Danmarkar og Føroya landsstýri, hinumegin), *Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek*, sbr. bekendtgørelse nr. 35 af 15. september 2006 om rettigheder for personer med handicap, og *Evropeiska mannarættindasáttmálan*, sbr. anordning nr. 136 af 25. februar 2000 om ikrafttræden for Færøerne af lov om den europæiske menneskerettighedskonvention.

### 2.9. Markaforðingar

Ongar kendar markaforðingar eru á økinum. Lógaruppskotið verður ikki mett at elva til markaforðingar.

### 2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv

Lógaruppskotið hevur vanligar revsiásetingar fyri brot á nærri tilskilaðar ásetingar i uppskotinum og heimild at áseta revsing fyri brot á fyrisitingarliga ásettar reglur.

### 2.11. Skattir og avgjøld

Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um skattir og avgjøld.

### 2.12. Gjøld

Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

### 2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?

Lógaruppskotið áleggur í útgangsstøði ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldir. Tó gevur lógaruppskotið kommunum heimild til at krevja, at eigari av bústaði útflýggjar viðkomandi upplýsingar um stutttíðarleiguvirksemi.

### 2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?

Lógaruppskotið leggur heimildir til landsstýrismannin um at áseta nærri reglur um skráseting av stutttíðarleigubústøðum, umframt eftirlit við dagatalsmarkinum. Eisini gevur lógaruppskotið kommununum heimild at krevja viðkomandi upplýsingar frá útleigarum, útleigupallum, elveitarum, tryggingarfyritøkum o.tíl. til arbeiðið at gera skrá og hava eftirlit við dagatalsmarkinum.

### 2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?

Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn uttan rættarúrskurð.

### 2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?

Lógaruppskotið verður ikki mett at hava aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### Til § 1

*Til stk. 1*

Við ásetingini verður skilmarkað, at tað bert eru sjálvstøðugir bústaðir, har útleigari ikki hevur sín fasta bústað sambært fólkayvirlitinum, ið eru fevndir av lógini. Sostatt er lógin ikki galdandi fyri stutttíðarleigu av bústaði, har útleigari sjálv/ur býr. Útleigarar skulu í hesum føri skiljast sum likamligir persónar. Um eitt felag ella aðrir løgfrøðiligir persónar eiga eina íbúð, sum verður leigað út til stutttíðarleigu – og íbúðin liggur í einum øki, sum kommunan hevur gjørt ásetingar fyri – er íbúðin fevnd av lógini. Einans sjálvstøðugir bústaðir, har likamligir persónar hava sín fasta bústað sambært fólkaeftirlitinum, eru ikki fevndir av lógini.

*Til stk. 2*

Ásetingin skilmarkar hugtakið stutttíðarleiga. Ásett verður, at leiga í styttri tíð enn tríggjar mánaðir er at skilja sum stutttíðarleiga.

Viðmerkjast skal, at hendan ásetingin vísir til hvørt einstakt leigumál, ið ikki kann vera longri enn tríggjar mánaðir, um talan skal vera um stutttíðarleigu. Er talan er um eitt einstakt leigumál, ið er longri enn tríggjar mánaðir, er talan um langtíðarleigu sambært leigulógini.

Tó ber væl til at leiga út til stutttíðarleigu meira enn tríggjar mánaðir árliga tilsamans. Dømi um hetta kundi verið, at ein íbúð verður leigað út í fýra mánaðir tilsamans, men har hvørt leigumál er fyri eitt tíðarskeið uppá ein mánað. Tað avgerðandi er, at eitt einstakt leigumál ikki er longri enn tríggjar mánaðir. Hetta er tó somuleiðis treytað av, at kommunan ikki hevur ásett mark fyri mest loyvda dagatali, sí viðmerkingar til § 2.

*Til stk. 3*

Ásetingin skilmarkar hugtakið sjálvstøðugir bústaðir. Ásett verður, at ein sjálvstøðugur bústaður skal skiljast sum bústaður við egnari adressu. Ein sjálvstøðugur bústaðir verður sostatt skilmarkaður sambært løgtingslóg um adressur (løgtingslóg nr. 17 frá 6. mars 2002). Eitt kamar í egnum bústaði er ikki at skilja sum ein sjálvstøðugur bústaður. Sama er galdandi fyri eina íbúð í egnum bústaði. Tó so kann talan til dømis vera um hús í tveimum hæddum við eini íbúð í hvørjari hædd. Í slíkum førum er talan um tveir sjálvstøðugar bústaðir, um búeindirnar eru hvør sín adressa.

Kjallaraíbúðir eru ikki fevndar av lógini, um tær eru partur av bústaði, har útleigari hevur sín fasta bústað. Høvuðsorsøkin er, at tað er sera trupult at skilmarka slíkar kjallaraíbúðir greitt sum sjálvstøðugir bústaðir, tí tær eru oftast partur av bæði somu adressu og matrikkuli, sum restin av húsinum.

**Til § 2**

*Til stk. 1*

Ásetingin gevur kommunum heimild til at gera reglur um mest loyvda dagatal fyri stutttíðarleigu. Greitt er, at stutttíðarleiguvirksemi er ymiskt í landinum. Í summum økjum er ynski um størri virksemi, meðan tað aðrastaðni kann vera tørvur á at tálma virkseminum.

Ásetingin gevur kommunum heimild til at áseta eitt dagatal, sum mett verður hóskandi fyri teirra øki. Verður dagatalsmark ásett, kann hetta í mesta lagi setast til tríggjar mánaðir. Einki niðara mark er fyri áseting av dagatali.

Í kommunum, har tað er trupult at fáa fastan bústað, ella har ov nógv stutttíðarleiguvirksemi órógvar trivnaðin í einum øki, kann dagatalið setast lágt. Har ynski er um størri ferðafólkavirksemi og gistingarmøguleikarnir eru fáir, kann dagatalið vera hægri ella óavmarkað.

Heimildin er eisini avmarkað til bert at fevna um sjálvstøðugar bústaðir, har útleigari ikki hevur sín fasta bústað sambært fólkayvirlitinum, sí § 1, stk. 1.

*Til stk. 2*

Ásetingin gevur kommunum heimild til at gera reglur, sum bert eru galdandi fyri ávís øki í kommununi. Um kommunur gera reglur fyri stutttíðarleiguvirksemi sambært stk. 1, skulu reglurnar ikki neyðturviliga galda fyri øll øki í kommununi. Dømi um hetta kundi verið, at Tórshavnar kommuna metir tað vera neyðugt at tálma stutttíðarleiguvirkseminum í ávísum økjum kring miðbýin í Havn, meðan ynski er um at økja um virksemi úti í Hesti. Í slíkum førum hevur kommunan heimild til at gera reglur, sum bert eru galdandi fyri ávís øki. Somuleiðis hevur kommunan við hesi ásetingini heimild til at undantaka øki frá ásetingunum í stk. 1, um hesi t.d. eru ætlaði til summarhús ella frítíðarbústaðir. Dømi um hetta kundi verið økir, har smáttur, hús ella íbúðir eru bygd burturav til ferðafólk. Í hesum økjum er helst eingin orsøk at avmarka møguleikarnar at leiga út.

Verða reglur gjørdar fyri ávís øki í eini kommunu, eigur kommunan at tilskila hesi øki greitt, so ivi ikki er um, hvørjir bústaðir eru fevndir av reglunum.

*Til stk. 3*

Við ásetingini kunnu reglur um mest loyvda dagatal í fyrsta lagi setast í gildi seks mánaðir eftir, at kommunustýri hevur samtykt tær. Nógv stutttíðarleigumál verða bókað væl áðrenn vitjanin fer fram. Við hesi áseting fáa útleigarar tíð at tillaga síni viðurskifti eftir møguligum avmarkingum um mest loyvda dagatal.

**Til § 3**

*Til stk. 1*

Við ásetingini verður álagt kommunum, ið gera reglur um mest loyvda dagatal, at gera skrá við dagførdum upplýsingum um sjálvstøðugar bústaðir, ið verða útleigaðir til stutttíðarleigu.

Eisini verður álagt kommunum at hava eftirlit við, at dagatalsmarkið verður hildið.

Kommunurnar leggja sjálvar eftirlitsarbeiðið til rættis, ið tó skal skipast soleiðis, at talan er um eitt vælvirkandi eftirlit við teimum reglum, ið kommunan ásetur. Í hesum sambandi kunnu kommunur samstarva um arbeiðið at gera skrá, eins og tær kunnu samstarva um eftirlitsarbeiðið við dagatalsmarkinum.

Ásetingin fevnir bert um teir bústaðir, ið eru fevndir av reglunum um mest loyvda dagatal.

*Til stk. 2*

Við ásetingini fáa kommunurnar heimild til at fáa til vegar neyðugar upplýsingar til arbeiðið at gera skrá og hava eftirlit við ásetta dagatalinum. Hugtakið "neyðugar upplýsingar" skal í hesum føri skiljast breitt, men tó avmarkað til arbeiðið at gera skrá og hava eftirlit við dagatalinum.

Viðkomandi kann t.d. vera hjá kommununum at fáa til vegar upplýsingar frá landsfólkayvirlitinum, tinglýsingini ella øðrum almennum skráum. Eisini kann vera viðkomandi at biðja um upplýsingar frá skattamyndugleikunum um møguligar inntøkur frá stutttíðarleiguvirksemi. Streymveitarar kunnu eisini vera viðkomandi fyri at vita, hvørjir brúkarar eru á adressuni, og tryggingarfyritøkur kunnu eisini útvega viðkomandi upplýsingar um t.d. innbústryggingar. Eisini kann vera viðkomandi hjá kommununum at fáa til vegar upplýsingar frá útleigupallum um einstøk stutttíðarleigumál. Við hesari ásetingini fáa kommunurnar heimild til tess.

Kommunur hava sostatt heimild til at útvega slíkar viðkomandi upplýsingar, ið tær meta tørvur er á fyri at røkka endamálinum at gera skrá við dagførdum upplýsingum um sjálvstøðugar bústaðir og at hava eftirlit við, at dagatalsmarkið verður hildið.

*Til stk. 3*

Ásetingin áleggur útleigarum at útflýggja kommununi viðkomandi upplýsingar til at gera skrá og hava eftirlit, sambært stk. 1. Somuleiðis verður álagt útleigupallum, streymveitarum, tryggingarfeløgum og tílíkum – eftir umbøn frá kommununi – at útflýggja allar viðkomandi upplýsingar til arbeiðið at gera skrá og hava eftirlit við dagatalsmarkinum. Tá slík umbøn verður send, skulu kommunur áseta eina hóskandi freist. Freistin skal sum útgangsstøði setast til tvær vikur, men kommunur kunnu leingja hesa freist, um hetta verður mett neyðugt ella um serligar umstøður gera seg galdandi.

Kommunur kunnu einans biðja um at fáa slíkar upplýsingar útflýggjaðar, um bústaðurin er fevndur av reglunum um mest loyvda dagatal.

*Til stk. 4*

Ásetingin gevur landsstýrisfólkinum heimild til at áseta nærri reglur um skráseting, umframt nærri reglur um eftirlit við dagatalsmarkinum.

Mett verður, at tørvur kann vera á at áseta nærri reglur um skráseting av stutttíðarleiguvirksemi og um eftirlit við hesum. Tað kundi t.d. verið viðkomandi at gjørt eina skipan til skráseting av stutttíðarleigubústøðum, ið allar kommunur kunnu – ella skulu – brúka. Reglur um hetta kundu verið ásettar í kunngerð. Hetta krevur tó, at ein skipan verður ment til endamálið.

Eisini skal havast í huga, at tøkniliga menningin kann gera tað viðkomandi at áseta nærri reglur um skráseting og eftirlit, serliga um hetta kann tryggja eina meira effektiva og smidliga tilgongd.

**Til § 4**

*Til stk. 1*

Við ásetingini kunnu brot á reglurnar, ásettar sambært § 2, stk. 1, revsast við sekt. Somuleiðis kann tann, ið ikki útflýggjar tær upplýsingar, sum kommunan umbiður, og innan ta freist, ið kommunan hevur ásett sambært § 3, stk. 3, revsast við sekt.

Brot á reglurnar fevnir eisini um tilætlað uttanumvik, sum á einhvønn hátt hava til endamáls at umganga tær reglur, sum eru ásettar eftir hesari lógini.

Tá sekt verður ásett, skal hon standa í rímiligum lutfalli til brotið og verða ásett soleiðis, at tað ikki loysir seg fíggjarliga at bróta reglurnar. Tá sektarupphædd verður ásett, kann m.a. verða lagdur dentur á álvarsemi í brotinum, um brotið er endurtikið, og um brotið hevur havt ella kundi havt við sær fíggjarligan vinning. Í hesum sambandi kann hugt verða eftir meginreglum, ið hava verið nýttar á skattaøkinum.

*Til stk. 2*

Við ásetingini verður nágreinað, at løgfrøðiligir persónar kunnu revsast fyri brot á lógina eftir reglunum í 5. kapitli í revsilógini.

*Til stk. 3*

Í reglum, ásettar sambært § 3, stk. 4, kann verða ásett, at brot á reglurnar verða revsað við sekt.

**Til § 5**

Ásett verður, at lógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

**Á Løgtingi, 5. august 2026**

Sirið Stenberg Bjørg Brynhildardóttir Egholm Høgni Hoydal

Hervør Pálsdóttir Liljan Weihe Eirikur í Jákupsstovu

Ruth Vang